# »Fimm komma fucking átta«

**NÝTT ØL** Tá bryggjaríið Okkara í dag alment varð tikið í nýtslu, hendi tað við einari røðu hjá Carl Johan Jensen, sum endaði við einari mergjaðari yrking, har høvundurin millum annað harmaðist alkoholprosent markið á 5,8

Leo Poulsen

So eru aftur tveir kappingarneytar á føroyska ølbryggingarmarknaðinum. Seinnapartin í gjár hevði Okkara móttøku í hølunum á Velbastað, har bryggjaríið formliga fór í gongd.

Tað er nú liðið eitt ár síðani fyrstu lutirnir komu til landið, og tað var partafelagið Thorshavn Mælke- og Margarinefabrikk, ið fór undir arbeiðið. Formaðurin í felagnum, Mikkjal Helmsdal, greiddi eitt sindur frá orsøkini til, at tað júst var innan bryggjaríverðina, at slepta margarinframleiðslan helt fram.

Hann greiddi eisini frá, at navnið Okkara er eitt gamalt merkisnavn, og at tað tí kendist rætt at leita navnið fram aftur.

Nevndarformaðurin, Óli Hansen, og stjórin, Wilhelm Petersen, greiddu eisini eitt sindur frá bryggjarínum og frá framleiðsluni, áðrenn Carl Johan Jensen við einari mergjaðari røðu og ikki minni mergjaðari yrking við íblásti frá sjálvum Tóri, Guði, alment setti framleiðsluna í gongd.

Passandi var tað eisini yrkjarin, sum fekk fyrsta slurkin av nýggja ølinum.

Framleitt hevur verið í morgun, og skipanin arbeiðir skjótt. Wilhelm Petersen segði, at framleiðslan hevði ligið á 3.700 dunkum um tíman.



**Fakta**

**Bryggjarí í Føroyum**

Restorff's Bryggjarí 1849-2007

Føroya Bjór 1888-

Okkara 2010

**NØGDUR**

*Wilhelm Petersen er stjóri á bryggjarínum, Okkara, og hann er væl nøgdur, nú bryggjaríið alment er farið undir framleiðslu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Alment verða tey trý ølsløgini frá Okkara, pilsnar, classic og gull, at fáa til keyps leygarmorgunin klokkan 10, tá handlarnir hjá Rúsuni lata upp kring landið.

### Kennist væl

Wilhelm Petersen, stjóri, var sjálvandi væl nøgdur, nú tað langt um leingi er komið hartil, at ølið fer út í handlarnar.

– Jú, tað kennist væl at vera komin so langt. Tað hevur verið eitt langt og drúgt arbeiði, serliga seinastu mánaðirnar, har ymisku loyvini eru komin upp á pláss, avtalur við avtakarar av ølinum eru gjørdar og skipanin royndarkoyrd, sigur Wilhelm Petersen.

Nú verða so hesar tríggjar ølirnar at fáa í rúsuhandlunum, og tappað verður í dunkar heldur enn fløskur.

Um vit hyggja at londunum uttan um okkum, so vindur dunkaølið ógvuliga nógv upp á seg. Brúkarin vil hava dunkar, tí teir eru handaligir, lættir og lættir at sleppa av við, sigur Wilhelm Petersen.

Okkara kemur inn á ein marknað, sum bara telur eitt annað føroyskt bryggjarí, men ein hóp av útlendskum.

– Hugsa vit um dunkarnar, so eru tað bara vit og útlendsku bryggjaríini, sum framleiða í dunkar, so á tí økinum er tað greitt ein kapping móti útlendsku bryggjaríunum. Men hugsa vit um góðsku, so er tað í kapping við hitt føroyska bryggjaríið, Føroya Bjór, sigur Wilhelm Petersen.




*Brøðurnir, Mikkjal Helmsdal, sum er nevndarformaður í Thorshavn Mælkeforsyning og Margarinefabrikk, og Høgni Jensen, sum er bryggjari á Okkara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

